Ætlaði ES-tollurin:

# Seinasti naglin í kistuna hjá alivinnuni

**– Støðan er rættiliga álvarslig. Avger ES um eina viku at leggja 15% í tolli á laks úr Føroyum, er eingin sum helst ivi um, at øll alivinnan í Føroyum fer á húsagang, sigur formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag, Atli Gregersen**

ALIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*– ES ætlar at koma við verjutollinum longu um eina viku. Tí er ógvuliga avgerandi, hvat hendir teir næstu dagarnar. Ja, hetta verður ein vika, har avgerðin fellir um, hvørt vit í Føroyum fara at hava ein farra eftir av eini alivinnu ella als onga alivinnu, sigur Atli Gregersen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag*

Føroyska alivinnan bløðir, og hon hevur bløtt leingi. Smoltstøðir hava latið aftur, og alifeløg hava mist allan sín eginpening og eru farin á húsagang. Útseting er lítil og eingin. Í 2002, tá ið vónir enn vóru um eina føroyska alivinnu, fóru 20 miljónir smolt á sjógv. Í fjør var talið 7 miljónir. Í ár hevur verið tosað um einar 3 miljónir smolt. ILA-sjúka og dumpingákærur hava saman við sera lágum laksaprísum gjørt tað næstan ómøguligt at reka alivinnu í Føroyum. Herfyri birtist tó ein pinkalítil vón aftur, tí laksaprísirnir eru batnaðir. Aftur kundu alarar selja laks við einum lítlum yvirskoti. Men treytin fyri, at tann parturin av vinnuni, ið er eftir, hevði nakran sum helst møguleika at fóta sær, er, at prísurin ikki fellir aftur.

Men bráddliga sær alt nú so kolasvart út aftur, tí ES - eftir áheitan frá skotum og írum, sum eru limir í ES - hevur ætlanir um at leggja ein verjutoll uppá eini 15% á laks úr eitt nú Noregi, Chili og Føroyum.

### Ógvuliga kritiskt

Atli Gregersen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag, sigur, at støðan er ógvuliga álvarsom.

– Fyri einum tveimum vikum síðan sendu vit nevndini í ES, sum hevur við laksin at gera, bræv, har vit siga okkum skilja skotar og írar. Í brævinum gera vit vart við, at vit kunnu taka undir við hugskotinum um kvotur fyri at minka um útboðið. Tí kemur tað ógvuliga dátt við, nú ES eftir øllum at døma ætlar, at verjutollurin eisini skal fevna um føroyska laksin.

Atli sigur, at tað, sum skotar og írar í fyrsta lagi vilja við tiltøkunum, er, at minka um útboðið av laksi úr Noregi og Chili.

– Men nú bendir mangt á, at Føroyar verða tiknar við, og tað er ógvuliga álvarsamt, nú føroyska alivinnan frammanundan bløðir so nógv.

Formaðurin í Havbúnaðarfelagnum sigur seg ivast í, um ES yvirhøvur hevur lisið brævið, sum felagið hevur sent teimum.

### Seinasti seymurin

Atli sigur, at verður ein verjutollur uppá 15% lagdur á laks úr Føroyum, fer eisini tann parturin, sum eftir er av føroysku alivinnuni, á húsagang.

– Tað er als eingin ivi um, at hetta verður seinasti naglin í kistuna hjá okkara alivinnu, sigur hann sannførdur og avgjørdur.

Hann sigur, at allar kreftir í føroyska samfelagnum mugu viðvirka til, at Føroyar ikki verða fevndar av verjutollinum.

– ES ætlar at koma við verjutollinum longu um eina viku. Tí er ógvuliga avgerandi, hvat hendir teir næstu dagarnar. Ja, hetta verður ein vika, har avgerðin fellir um, hvørt vit í Føroyum fara at hava ein farra eftir av eini alivinnu ella als onga alivinnu.

Formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag sigur, at megnar føroyska samfelagið komandi vikuna ikki at sannføra ES um, at Føroyar eiga at haldast uttanfyri verjutollin, fer øll tann føroyska alivinnan í søguna.

### Fundur við løgmann

Stutt fyri middag hósdagin fór Føroya Havbúnaðarfelag á fund við løgmann, Jóannes Ejdesgaard, um støðuna.

– Løgmaður hevur um hendi uttanríkisdeildina, og vit hava biðið um fund við løgmann, tí hetta málið hevur ógvuliga stóran skund, sigur Atli.

Hann heldur annars, at skulu vit hava eina alivinnu í Føroyum, er neyðugt við einum øðrum tilknýti til ES.

– Alivinnan kann ikki liva við hóttandi dumpingákærum og hóttanum um verjutoll. Vit eiga avgjørt at taka uppaftur viðgerðina um okkara tilknýti til ES, sigur Atli Gregersen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelag, at enda.



*– Alivinnan kann ikki liva við hóttandi dumpingákærum og hóttanum um verjutoll. Vit eiga avgjørt at taka uppaftur viðgerðina um okkara tilknýti til ES, sigur formaðurin í Føroya Havbúnaðarfelag*

# Danskir næmingar vitja Sosialin

Danskir studentaskúlanæmingar, sum útbúgva seg við serligum atliti til fjølmiðlarnar, eru í hesum døgum í Føroyum. Hesin flokkurin, sum er av Bornholm, hevur eitt samstarv við flokkar í Hoydølum um útveksling av næmingum. Samstarvið ber í sær, at næmingar av Bornholm kunnu koma til Føroyar, og næmingar úr Hoydølum kunnu fara til Bornholm.

Donsku studentaskúlanæmingarnir vóru úti á Sosialinum og kunnaðu seg um viðurskiftini í einum fjølmiðlahúsi. Teir hildu tað vera spennandi at samanlíkna føroyska fjølmiðlaheimin við umstøðurnar á Bornholm.

– Tað er stuttligt at samanlíkna við okkara egna har heima, har vit hava umleið 45.000 fólk. Eg haldi ikki, at munurin er stórur. Talið av arbeiðsfólki er nakað tað sama, sigur Daniel Jensen, sum gongur í studentaskúla á Bornholm.

Nønne Ingbrecht er eisini við sama flokki, og hon heldur tað verða eitt sindur ymiskt frá viðurskiftunum har heima.

– Nú gera tit útvarp her og royna nøkur onnur ting. Á Bornholm er tað kanska eitt sindur meira konservativt, sigur Nønne Ingbrecht, studentaskúlanæmingur.

**hkm**




*Donsku studentaskúlanæmingarnir vóru úti á Sosialinum og kunnaðu seg um viðurskiftini í einum fjølmiðlahúsi*



# Ætla at skapa arbeiðspláss til nógvar hendur í Suðuroy

**Í fyrstu syftu verður arbeiðið til eini 50-70 fólk í syðru helvt í Suðuroy, men gongur sum ætlað, verður hetta talið nógv størri**

FYRITAKSEMI
*Áki Bertholdsen,*
*aki@sosialurin.fo*



*- Vit biðja ikki um studning. Tað einasta, vit biðja um, er at fáa loyvi til at útvega eitt skip, sum pláss er fyri í føroyska flotanum, sigur Finnbjørn Poulsen í Lopra, sum er ein høvuðsmaður aftanfyri stóra vinnuliga ætlan í Suðuroy*

–Vit hava eina ítøkiliga ætlan sum fer at menna Suðuroynna. Og vit hava eisini pening til at seta hesa ætlan í verk. Nú stendur tað bara til politiska myndugleikan, um hann tekur av ella ikki.

Finnbjørn Poulsen, skipari í Lopra, er ein av høvuðsmonnunum aftanfyri eina víttfevnandi vinnuliga ætlan, sum fer at skapa nógv arbeiðspláss í Suðuroy.

Eydnast hendan ætlanin, fer tað í fyrstu syftu at skapa arbeiði til eini 50-70 fólk. Men gongur sum ætlað, fer hetta talið sum frálíður at økjast enn meiri.

Tað, sum Finnbjørn og hansara samstarvsfelagir ætla, er bæði at útvega skip og at byggja nýtt virki til at virka fisk á landi.

Tað eru nú tveir mánaðir síðani, at teir vóru í Fiskimálaráðnum við eini umsókn um at fáa loyvi til at útvega skip og um at fáa fiskiloyvi til skipið.

– Tað, vit ætla, er at útvega eitt skip til uppisjóvarfisk og sum skal fiska svartkjaft, lodnu, sild og makrel.

Men samstundis er ætlanin at gera eitt virki á landi til at virka uppisjóvarfisk til matna til útflutnings.

Skipið, teir søkja um, skal vera ein partur av rávørugrundarlagnum undir virkinum.

Men samtundis hava teir gjørt avtalur við onnur skip um avreiða til virkið fyri at tryggja nóg nógva rávøru.

### Eru ikki skutilsveinar

Skiparin úr Lopra sigur, at hetta er ein ætlan, sum teir hava hugsað væl og virðiliga um.

– Vit hava havt serkøn á økinum til at gera marknaðarkanningar fyri okkum og útlitini eru sera góð. Samstundis hava teir longu útvega neyðuga peningin til at seta ætlanina í verk

Teir, sum standa fyri ætlanini, drúgvar royndir í uppisjóvarvinnuni. Teir hava bæði siglt við og ført donsk nótaskip í eitt áramál.

–Annars halda vit, at tað er ikki meiri enn rímiligt, at landsins myndugleikar eisini lata yngri menn við drúgvum royndum, sleppa framat í føroysku fiskivinnuni.

Hann leggur afturat, at samstundis eru teir fúsir til at binda hetta fiskiloyvi, teir søkja um, til Suðuroynna, so at tað ikki eisini endar norðanfyri, soleiðis sum fleiri onnur fiskiloyvi í Suðuroy eru endað seinastu árini.

Hann sigur eisini, at teir hava lutfalsliga nýggj skip í kikaranum, sum tað ber til at keypa fyri einar 40-50 milliónir. Talan er um skip, ið taka 1500-2000 tons.

Og Finnbjørn Poulsen leggur dent á, at talan er um eina føroyska ætlan og at teir ikki eru skutilsveinar fyri útlendsk, peningalig áhugamál.

Hann leggur afturat, teir biðja sostatt ikki um eitt oyra í studningi.

– Tað einasta, vit biðja um, er um loyvi til at útvega eitt skip og um fiskiloyvi til upisjóvarfisk, so at vit sleppa ígongd. Sostatt liggur lagnan hjá hesi verkætlanini nú í hondunum á politiska myndugleikanum.

### Væntar undirtøku

Men lopransmaðurin ivast ikki í, at politiski myndugleikin fer at vísa vælvild.

Hann sipar til flaggrøðuna, sum sjálvur løgmaður helt í Vági og har Jóannes Eidesgaard segði, at Landsmyndugleikarnir eiga at gera sítt til at lofta tiltøkum og stuðla teimum, so at tey kunnu fremjast.

– Vit seta álít á, at hetta ikki eru tóm orð, tí talan eru um orð frá sjálvum løgmanni. Finnbjørn Poulsen sigur, at fortreytin fyri ætlanini er júst, at landsstýrið loftar tiltakinum og stuðlar tiltakinum, so at tað kann fremjast.

Hann vísir eisini á, at Suðuroyggin eigur ongan lut í uppisjóvarvinnuni og tí er ætlanin sera viðkomandi,serliga tá ið hugsað verður um tað stóru kreppu, sum økið er í.

Hann vísur eisini á, at tað eru ikki ov nógv uppisjóvarskip í flotanum, sum er og at tað tí er rúm fyri hesum afturat við teimum fiskirættindum, vit hava.

– Føroyingar hava ligið sjóvarfallið av sær í uppisjóvarvinnuni og hava verið alt ov trekir at útvega sær skip til endamálið. Sostatt koma vit eisini at vera eftirbátur, tá ið svartkjafturin einaferð verður býttur sundur ímillum tey ymsu londini.

Finnbjørn Poulsen vísur eisini á, at í fjør var føroyska kvotan av atlantssildini uppfiskað fyri fyrstu ferð í nógv ár.

– Men tað allarmesta av henni varð avskipað til móðurskip. Eg haldi ikki at tað er rætt at lata fyrsta floks rávøru fara til djóraføði, bara fyri at fáa kvotuna uppfiskað, heldur enn at virka hana til matna, har hon gevur munandi meiri úrtøku.

Samstundis vísa teir eisini á, at lodnan undir Íslandi, Grønlandi og í Barentshavinum eru eisini áhugaverd fiskasløg hjá einum skipi, sum suðuroyingarnir hugsað um, eins og hestamakrelur og nebbasild í kanalini og í Norðsjónum og vestanfyri fýra stig, eisini eru tað.

Harafturat eru umstøðurnar í Vági sera góðar at fara undir nýtt virksemi við tað, at nýggj djúphavn verður gjørd og stórir virkisbygningar tanda tómir.

Finnbjørn Poulsen sigur, at endamálið við teirra virkisætlan, er, at fáa sum mest burturúr fiskatilfeinginum og at úvega so nógv arbeiðspláss sum gjørligt.

Hann sigur, at í fyrru atløgu er ætlanin at frysta lidnar og hálvlidnar vørur á virkinum á landi.

Men gongur sum ætlað, er í aðru atløgu ætlanin at virka fiskin víðari til matnað og tað fer at skapa enn fleiri arbeiðspláss.

Finnbjørn Poulsen vónar, at teir fáa svar úr landsstýrinum skjótt, tí gongur ov long tíð, kunnu skipini, teir hava í kikaranum, gleppa teimum av hondum.

Hann leggur afturat, at fáa teir ikki loyvi til at seta hesa verkætlanina ígongd í Suðuroy, fara teir at leita aðrastaðni við henni.

### Verri enn í kreppuni

Finnbjørn Poulsen sigur at veruleikin er, at í Suðuroy er støðan í dag enn verri enn hon var, tá ið kreppan var upp á tað ringasta fyri 10-14 árum síðani. Og enn sum áður stendur serliga illa til í syðru helvt, her arbeiðsloysið er rættiliga stórt.

– Suðuroyggin er á veg um tað kritiska markið, haðani tað ikki vendist aftur, Hinvegin frættist lítið og onku um vinnuligar ætlanir.

Samstundis hevur dúgliga verið sóknast eftir vinnuligum ætlanum, eins og tað mangan er sagt, at framtøkini mugu koma frá suðuroyingum sjálvum.

Finnbjørn Poulsen sigur, at hetta er so ein væl undirbygd roynd at skapa nakað nýtt í oynni.

## Bygdarstevna í Hvalba



*Nógv av bygdarstevnuni í Hvalba fer fram í og rundanum Roynhøllina*

Hetta vikuskiftið skipa verður ársins fyrsta bygdarstevna. Tað er Bóltfelagið Royn, sum skipar fyri stevnuni, sum byrjar í dag, fríggjadagin og heldur fram til sunnudagin.

Á skránni er ymiskt, bæði til alvara og gaman.

Stevnan verður sett fríggjadagin klokkan 14, tá ið Arnold Eyvindsson, hvalbingur í Havn, heldur røðu og síðani verður hildið á.

Sum vera man er nógvur fótbóltur á skránni, bæði hjá teimum eldru og teimum yngru.

Í Roynhøllini verður tivoli við alskyns stuttligum og annars verður skipað fyri yjmsum tiltøkum.

Eitt serligttiltak á stevnuni verður, tá ið Atli Petersen úr Kvívík, sum sigldi úr Føroyum til Danmarkar á vatnskutara, fer at greiða frá ferðini á Vesturskin fríggjakvøldið, har hann eisini vísir myndir frá ferðini.

Á bygdarstevnuni verður eisini høvið til at royna vatnskutararnar.

Ongin bygdarstevna uttan dans og hesuferð er tað ein av landins allarbestu bólkum, Showmenn, sum spælir. Fríggjakvøldið spæla teir til konsert og leygarkvøldið spæla teir til stóran stevnudans, bæði fyri tey yngru og tey eldru.